ljósar løtur í samkomuni eisini. Men hóast alt, so hevur tað havt sín prís, at leggja alt niður í tænastu fyri Harran.

Tummas kundi valt, at havt eina stóra karrieru í samfelagnum, ( Tað hevði hann áðrenn hann gjørdist samkomuleiðari fulla tíð), men hann valdi Filadelfia og at tæna Harranum, og eg trúgvi ikki, at tað altíð hevur verið lætt.

Sum samkomuleiðari halda øll, at tey eiga ein, og nógv krevja nógv av leiðsluni, og tá kann tað koma at verða smátt býtt, tað mann hevur eftir til familjuna, so tøkkin frá samkomuni er bæði til, Tummas, Sólrún, børn, svigarbørn ommu og abbabørn fyri alt.

Fyri tykkum, ið hava tikið yvir, hevur alt nú fingið nýggjar litir, nakað nýtt, spennandi og samstundis avbjóðandi stendur fyri framman.

Tað er altíð umráðandi at vera trúgvur móti sær sjálvum, hvat tit enn møta, og hvat onnur enn meina um tykkum.

Tá mann velur at siga ja til at stilla seg í fremstu røð, ger mann seg samstundis sárbæran, hetta tí at øll hava eina meining um, hvussu ein skal vera, hvat ein skal gera, og óansæð hvat mann ger, ber illa til at gera øll nøgd.

Tað, at kunna fáa signing frá teimum, ið hava staðið í tænastuni undan tykkum, er stórt.

Eg vil við hesum minna okkum øll á, Præd. 3,14: *Eg dugdi at síggja, at alt, ið Gud ger, verður í allar ævir; einki kann leggjast afturat tí og einki kann takast burtur av tí; og so hevur Gud gjørt tað, fyri at vit skulu óttast Hann.*

Lat okkum tí reisa okkum, rista dustið av okkum og ganga leiðina, Hann hevur lagt fyri okkum.

*ÁO*

## Logos–Bróstsukur



Fyrsta vika í februar í ár er eitt ár síðani vit byrjaðu at framleiða vælsmakkandi bróstsukrini aftur. Væl hevur gingið og hevur undirtøkan verið góð. Vit hava tríggjar fastar kundar, sum eru Jysk, Smyril og Inn handilin hjá Janu og Jaspur.

Endmálið við framleiðsluni er, at allur ágóðin av søluni fer til missión. Tað eru nógvir mátar, at røkka endamálinum í Matt. 28:18.-20.

Vit trúgva, at vit við at signa Harrans tænarar við tí ágóða, sum kemur av søluni av bróstsukri, eru við til at fremja Matt. 28.19.-20 í verki.

Vit ynskja framhaldandi, at standa í hesum verki, sum vit vita er við til at náa menniskju fyri Kristus og ynskja vit, at øll, sum hava áhuga í at hjálpa til við arbeiðinum, skulu fáa møguleika at hjálpa til við at ringja ella við at senda ein sms til Sonni Djurhuus, sum hevur ábyrgdina av arbeiðinum á tlfnr: 212084. Eisini ber til at melda seg til á messenger tráðnum hjá Sonna.



Filadelfia
„Himmal á jørð"

# Alt hevur stund sína



Prædikarin 3,1 sigur: *Alt hevur stund sína, og hvør fyritøka undir himli hevur tíð sína.*

Prædikarin 3,14 sigur: *Eg dugdi at síggja, at alt, ið Gud ger, verður í allar ævir; einki kann leggjast afturat tí og einki kann takast burtur av tí; og so hevur Gud gjørt tað, fyri at vit skulu óttast Hann.*

Ørindi 15: *Tað, ið er, var longu fyrr, og tað, ið verður, hevur eisini verið fyrr; Gud leitar upp tað, ið farið er.*

Tá menn og kvinnur fóru undir at byggja hetta húsið og stovna eina samkomu á hesum stað, hevði tíð sína. Og var tað ein stór gleði, at vit 16. september 2023, kundu hava veitslu í samband við 50 ára dagin fyri, at Filadelfia varð sett á stovn.

Allir teir fyristøðumenn, ið hava verið í Filadelfia, hava havt tíð sína, men teirra arbeiði verður ikki burtur, tí tað er á teirra verk vit byggja víðari.



Tá vit tann 14. januar høvdu fráfaringarløtu fyri Tummas, var dagurin nakað serligt.

Tá dagurin varð planlagdur, vistu vit ikki, at Margretha drotning kom at leggja frá sær og at vit fóru at fáa nýggjan kong henda dagin.

Tað er ymiskt hvussu vit síggja uppá leiðslu, og tað er í míni verð nakað heilt serligt, at hava tænt einari samkomu sum okkara í so nógv ár, sum Sólrún og Tummas hava.

At vera leiðari, har høvuðsuppgávan er, at formidla tann boðskap og ta leið, ið Harrin ynskir samkoman skal fara, krevur nakað serligt.

Hvussu væl mann enn eydnast sum

# FEBRUAR 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 3. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 4. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Fríðbjørn og Linda |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Anna G. |
| | | | Lovsongsleiðari: |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Anna-May |
| | | | Kaffivertar: Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 5. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Regin |
| Leygardagur | 10. | | **Reingerð:** Margreth og co. |
| Sunnudagur | 11. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Hildibrandur |
| | | | Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Tummas J. |
| | | | Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 12. | Kl. 19.00 | **Felagsbønarmøti í Kelduni** |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Keldan |
| Leygardagur | 17. | | **Reingerð:** No-omi og co. |
| Sunnudagur | 18. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting – inns. til húsið** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari:Sam |
| | | | Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 19. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Regin |
| Leygardagur | 24. | Kl. 10.00 | **Hugnaløta v. Hallur** |
| | | | **Reingerð:** Merlie og co. |
| Sunnudagur | 25. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Sámuel |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkut I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Poli Jacobsen |
| | | | Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 26. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

leiðari, kemur mann ongantíð at gera øllum til vildar, tí tað er altíð onkur, ið er ónøgdur og ynskir at mann ger okkurt annað.

Ein slíkan dag, har mann hevur fráfaringarløtu, er tað sjálvandi soleiðis, at vit øll føla sorgblídni við at siga farvæl, men samstundis eru vit spent uppá, hvussu tann nýggja leiðslan kemur at roynast.

Mín áheitan á samkomuna er, at tað er umráðandi at minnast til, at sjálvt um mann stendur í fremstu røð, so er mann eitt menniskja. Talan er um fólk, ið leggja sítt egna niður fyri at tæna okkum, og tí hava tey alla virðing uppiborna.

Í dag hava vit ikki somu avbjóðingar, sum vit høvdu, tá Tummas og Sólrún tóku við sum fyristøðupar í 1994, men eru avbjóðingarnar øðrvísi.



Tað er eitt, ið eg havi hugsað um í samband við tað arbeiði, ið Sólrún og Tummas hava staðið fyri í samkomuni, og er tað boðskapurin úr bókini „Den lille prins“. Kjarnan í boðskapinum hjá franska rithøvundinum Antoine de Saint-Exupery er, at mann einans sær rætt við hjartanum, og tað sum hevur størst týdning, ikki sæst við eygunum. Tað eru følilsini og ikki intellektið, ið telur mest her í lívinum.

Trúgvi neyvan, at hetta, at síggja við hjartanum er nakað, vit kunnu læra, trúgvi heldur, at tað er nakað viðføtt.

Eitt av tí, ið hevur størstan týdning, tá mann leiðir ein so fjølbroyttan hóp er, at mann á ein ella annan hátt megnar at leiða soleiðis, at øll kenna seg virdan og kenna, at tey hava týdning.

Sum áður nevnt, við at síggja við hjartanum, og við at brenna fyri sakini, kemur mann langt ávegis.

Okkara lív hevur ymiskar løtur, summar eru myrkar, meðan aðrar eru ljósar. Tað er onki at ivast í, at tað hava verið tíðir, har bæði tú Tummas, Sólrún og familjan hava kent tað soleiðis, at tað hevur brotið í bæði borð, og litirnir hava verið myrkir. Men eg trúgvi somuleiðis, at tey hava upplivað nógvar litríkar og